

## Matfestivalur í Havn

Vikuskiftið 14.-16. august fer fyrsti føroyski matfestivalur av bakkastokki. Høvuðsstaðurin, sum fyllir 100 og er mitt í landinum, fer at leggja karmar til innan- og uttandura tiltøk. Eldsálir, kokkar og kókikonur, glaðir amatørar, urta-kønir, tara-serfrøðingar, skeljadjórs-kavarar, bóndir, slaktarar, bakarar, bryggjarar, meiaristar, kostráðgevar, granskarar, matstovur og matvøruvinnufólk fara í felags fagnað at sameina gamalt og nýtt, forkunnugt og vanligt, og gera eina roynd at staðfesta hvussu vítt er til veggja í føroyskari matmentan. Um dagin verður høvi at vitja framsýningar-básar og um kvøldið fara matstovurnar í Havn at borðreiða við fyrstafloks mati burtur úr føroyskum rávørum.



# Pensjónistur mátti brúka 2200 krónur til heilivág

**Eftir at samgongan skerdi stuðulin til heilivág til pensjónistar, eru tað fleiri pensjónistar, sum mugu halda upp at at taka neyðugan heilivág**

PENSJÓNISTALÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið eini pensjónisthjún nú ein dagin fóru á Apotekið eftir heilivági, fingu tey ein rættiligan skelk.

Tey eru von við at heilivágurin kostar 400 krónir.

Men hendan dagin í farnu viku, tey vóru á apotekinum, kostaði hesin sami heilivágurin brádliga 2200 krónur.

Orsøkin til hesa risa príshækkingina, er, at samgongan hevur samtykt at skerja stuðulin til heilivág til pensjónistar.

Áðrenn broytingina skuldi hvør pensjónistur, sum onki annað hevði at liva av, uttan fólkapenjón og samhaldsfasta, betala 200 krónur um ársfjórðingin fyri heilivág.

Restina fekk hann ókeypis.

Men nú er minsta tilskotið hækkað upp í 400 krónur um ársfjórðingin.

Men, tað, sum er uppaftur álvarsligari er tað, at nú er alt tilskot eisini avtikið til heilivág, sum sjúkrakassin ikki gevur tilskot til.

Her er talan um vitaminir, jarntablettir, kálktablettir og annað ískoyti.

### Ikki ráð til heilivág

Avleiðingarnar av hesum sparitiltakinum hjá samgonguni er farið at merkjast av álvara nú eftir 1. juli, tá ið ein nýggjur ársfjórðingur byrjaði.

Og tað var hetta, sum rakti áðurnevndu pensjónistahjún sum ein hamara í høvdið hendan dagin, tey vóru á apotekinum eftir heilivági.

Umframt ymsan vanligan heilivág, var tað neyðugt hjá hesum hjúnunum at fáa kálk fyri at halda beinagrindina sterka og jarn fyri at halda blóðprosentinum umframt annan heilivág.

Men nú er avgjaldið til alt hetta tikið av og tí fingu tey hesuferð eina rokning í høvdið á Apotekinum upp á 2200 krónur fyri hendan ársfjórðingin, har tey áður plagdi at betala 200 krónur í part, ella 400 krónur tilsamans.

### Neyðugt ískoyti

Sigvald Kristiansen, formaður í Landsfelag Pensjónista, sigur, at hetta er eitt av teimum ógvusligu dømunum.

Men hann staðfestir, at hetta var ein ómetaliga dyggur smeitur hjá einum pensjónistahjúnum, sum onki annað hava at liva av uttan fólkapensjón og samhaldfasta.

*Síðani samgongan broytti lógina, er heilivágurin til pensjónistar blivin so dýrur, at nógvir pensjónistar hava ikki ráð til neyðugan heilivág*

Men Sigvald Kristiansen, sigur, at sum mánaðurin líður, fáa tey í Landsfelag Pensjónista fleiri og fleiri fráboðanir frá pensjónistum, sum mugu gjalda fleiri hundrað krónur meiri fyri heilivágin, enn tey plaga.

Hann er eisini lækni og hann sigur, at tað er avgjørt neyðugt, at pensjónistar fáa vitaminir kálk og annað ískoyti fyri at sleppa undan skaðum og sjúkum.

Men skerjingin hjá samgonguni rakar eisini ymsan kost til sjúklingar við sukursjúku, so skulu teir framhaldandi halda seg til rætta kostin, er tað blivið dýrari at hava sukursjúku.

Pensjónistar siga fyri Sosialinum, at tað nú er blivið ein fíggjarligur spurningur, hvat tey fáa ráð til av heilivági, sum tey eiga at taka fyri at varðveita eina so góða heilsu, sum gjørligt.

Sum tað sæst í aðrari grein her á síðuni, ætlar Miðflokkurin nú at broyta lógina, so at pensjónistar aftur fáa bíligari heilivág.

# Vil hava Løgtingið at rætta mistak ímóti pensjónistum

**So skjótt Løgtingið kemur saman á ólavsøku, sleppur tað at taka støðu til pensjónistar framhaldandi skulu hava so dýran heilivág at teir ikki hava ráð at taka hann, sigur Jenis av Rana úr Miðflokkinum**

PENSJÓNISTALÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Løgtingið eigur at rætta eitt mistak, áðrenn óneyðugar vanlukkur raka pensjónistarnar.

Jenis av Rana, sigur, at so skjótt Løgtingið kemur saman á ólavsøku, fer Miðflokkurin at leggja uppskot fram um at lata pensjónistar fáa bíligari heilivág.

Hann vísir á, at samgongan hevur skert tilskotið til heilivág til pensjónistar. Men samstundis er tilskotið tikið av til heilivág, sum sjúkrakassin ikki gevur tilskot til. Her er talan um vitaminir, mineralir, kostískoyti og ymsan pínustillandi heilivág.

Stuðulin verður roknaður fyri hvønn ársfjórðin og sum vit greiða frá í aðrari grein her á síðuni, eru avleiðingarnar av hesum rættiliga farin at merkjast nú eftir 1. juli, tá ið nýggjur ársfjórðingur byrjaði.

Jenis av Rana sigur, at nú fer Miðflokkurin at leggja uppskot fyri Løgtingið, so at tilskot aftur verður latið til vitaminir, mineralir og annað, sum nú hevur mist tilskotið.

- Tá ið samgongan skerdi tilskotið, varð ávarað ímóti hesum í Løgtinginum, sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum.

### Ávaringarnar vóru rættar

Hann sigur, at fleiri løgtingslimir vístu á, at vandi er fyri, at pensjónistar, sum ikki hava góðar eftirlønarskipanir, ikki longur hava ráð til at keypa týdningarmiklan heilivág. Hann sigur, at hjá heilt nógvum pensjónistum eru vitaminir, mineralir, ymiskur náttúruheilivágir sera týdningarmiklir og tí eiga teir eisini at fáa tilskot til hann.

- Og nú teir fyrstu dagarnar í juli mánaða eru farnir aftur um bak og pensjónistarnir fara eftir heilivági til hendan ársfjórðingin, vísir tað er, at ávaringarnar vóru rættar, tí summar av rokningunum eru rættiliga nógv hægri, enn pensjónistarnir eru vanir við.

- Teir pensiónistar, ið bara hava fólkapensión og samhaldsfasta at liva av, kunnu skjótt koma í ta støðu, at tey noyðast at velja ímillum mat og klæðir ella vitaminir og mineralir.

Tí heldur hann, at Løgtingið eigur at rætta hetta, sum hann kallar eitt mistak ímóti pensjónistunum, áðrenn óneyðugar vanlukkur raka hesar veikastu samfelagsborgarar okkars, sum hann tekur til.